## Skjóta um vikuskiftið

Eftir ein steðg í fleiri ár, verður nú aftur farið undir FM-kappingar í skjóting. Nú eru aftur tvey virkin feløg, Sunda Byrsufelag og Byrsumúli, so tí hevur Byrsudeildin tikið avgerð um, at nú verða FM-kappingarnar tiknar uppaftur. Leygarmorgunin 29. august verður kappast í skeet á breytini hjá Sunda Byrsufelag, og leygarmorgunin 5. september verður kappast í trap á breytini hjá Byrsumúla.



# Allir eru klárir

**Bæði KÍ og Víkingur kunnu senda manningar á vøllin í kvøld, sum mestsum eru tað frægasta, liðið eiga. Fyri KÍ er enn eina ferð talan um ein dyst, har alt stendur upp á spæl, meðan Víkingur skal verja silvurplássið**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Ikki kann sigast annað, enn at fortreytirnar hjá KÍ og Víkingi eru sera ymiskar undan dystinum í Klaksvík í kvøld. Liðini eru í hvør sínum enda, og annað av tveimum, tey í løtuni hava til felags, er at tey øðrumegin seg hava átta lið og hinumegin eitt – ávikavist botn- og toppliðið í Vodafonedeildini. Hitt, tey hava til felags júst nú, er at bæði taptu sunnudagin.

KÍ er aftur í ár í trupulleikum í niðara endanum og tilveran hevur verið niðan fyri niðurflytingarstrikuna. So hvørt sum tíðin er gingin, er fótbóltshýrurin versnaður nógv, men hann batnaði tó nakað, tá liðið fekk styrk í summarsteðginum og síðani vann á liðnum, ið liggur niðanfyri, 07 Vestur. Men annars er støðan óbroytt, tí enn hóttir niðurflytingin.

Hinvegin hevur hetta verið eitt framúr ár hjá Víkingi, sum bara hevur verið til síðani í fjør. Steypafinalan var vunnin, samstundis sum liðið mestsum alla tíðina hevur verið við í kappingini heilt har frammi. Hóast oddasessurin í løtuni er 10 stig burturi, er málið framvegis at vinna so góð heiðursmerki sum gjørligt, og í kvøld ætlar Víkingur at vera silvurplássið.

Hjá KÍ eru allir teir »nýggju« klárir at fara inn á vøllin. Todi Jónsson hevur verið skaddur síðstu dystirnar, men er nú klárur aftur. Hinvegin er meira ivasamt, um Rudolf Eliasen, sum fór út við skaða í Runavík sunnudagin, er klárur aftur.

Víkingur kemur til Klaksvíkar við øllum sínum fólki, tí har eru allir tøkir, sum hava verið tað síðstu mongu dystirnar. Einasta undantakið er Símun Louis Jacobsen, sum er farin niður og tí ikki verður við.



Oddmar á Lakjuni, Steffan Kalsø og Heðin á Lakjuni høvdu tvær ferðir orsøk til at frøast sunnudagin, men taptu kortini. Spurningurin er so, um betur gongst í hond ímóti Víkingi í kvøld

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# Meistaramøti í Gundadali

**Alt bendir á, at dysturin í kvøld millum HB og EB/Streym er eitt møti millum meistararnar í fjør og liðið, sum verður meistari í ár. Bæði lið hava týðandi spælarar sitandi uttanfyri**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tey fýra liðini, sum renna aftan á HB, eru í hesum døgum dystarskráin hjá oddaliðnum. Sunnudagin fall B68 í Gundadali, og nú er EB/Streymur tað næsta av hesum liðum, ið stendur fyri tørni. Síðani koma NSÍ og Víkingur í tveimum teimum næstu dystunum.

Spurningurin er bara, hvussu spennandi hesir dystir eru, tí HB er heili 10 stig framman fyri tað ovasta av teimum. Skal nakað teirra gera sær vónir um at fáa HB aftur, skal viðkomandi lið vinna alt, sum eftir er, umframt at HB síðstu átta dystirnar skal missa í øllum førum 14 stig. Og tað ljóðar meira sum hugsað støddfrøði enn veruleiki.

HB noyðist í kvøld at vera toppskjútta sín fyriuttan, tí sunnudagin fekk Andrew av Fløtum tvey gul kort, og heldur ikki er Vagnur Mohr Mortensen ordiliga klárur enn. Heldur ikki spælir Jógvan Rói Davidsen, sum í Klaksvík var so óheppin at bróta fótin, tá gaggan brádliga knekkaði. Hinvegin er Rasmus Nolsøe heima hesa vikuna, so hann verður við.

Hjá EB/Streymi er støðan ikki mætari, tí bæði Pauli G. Hansen og Gudmundur Nielsen eru skaddir, umframt at Alex José dos Santos framvegis hevur karantenu fyri útvísingina í Fuglafirði fyri tveimum vikum síðani. Á málmansplássinum eru kortini fleiri møguleikar, enn tað hava verið leingi, tí René Tórgarð er nú klárur aftur, og hann spældi við sunnudagin.